# Vit arbeiddu seriøst

**EIK** – Reidar Nónfjall kann ikki vita, hvat er gingið fyri seg í nevndarhølinum, men eftir míni meining hevur verið arbeitt seriøst, sigur Bjarni Olsen, fyrrverandi stjóri í Eik




*– Vit eru partur av einari heimsumfatandi fíggjarkreppu! Tað er ikki ein umbering, men ein sannroynd, sigur Bjarni Olsen, fyrrverandi stjóri í Eik Banka*

Áki Bertholdsen

– Eik er ikki einsamallur um at vera komin í trupulleikar. Vit eru partur av einari heimsumfatandi fíggjarkreppu! Tað er ikki ein umbering, men ein sannroynd, sigur Bjarni Olsen, sum var annar av stjórunum í Eik Banka, sum fekk álvarsamar fíggjarligar trupulleikar.

Í samrøðu í blaðnum í dag finnist Reidar Nónfjall, stjóri á Handilsskúla Føroya, harðliga at leiðsluni í Eik Banka.

– Hatta er sjónarmið, sum eg fyrisovitt kann skilja og eisini havi virðing fyri, hóast tey ikki kunnu sigast at úttrykkja virðing fyri stjórn og leiðslu Eik, sigur Bjarni Olsen.

– Tað er sjálvsagt heldur ikki lætt at varðveita, tá bankin er farin fallitt – og tað jú er stjórn og leiðsla sum hava ábyrgdina av bankanum! Reidar Nónfjall kann ikki vita, hvat er gingið fyri wseg í nevndarhølinum, men eftir míni meining hevur verið arbeitt seriøst, sigur hann.

## Heimsumfatnandi kreppa

Bjarni Olsen vísur á, Eik Banki er ikki einsamallur um at vera komin í trupulleikar.

– Vit eru partur av einari heimsumfatandi fíggjarkreppu! Tað er ikki ein umbering, men ein sannroynd, sigur hann.

– Hartil liggur tað mær nógv á sinni at sláa fast, at vit halda okkum hava ein vælriknan banka í Føroyum við sera dugnaligum starvsfólk, sum onga ábyrgd hava av teimum avgerðum, ið stjórn og nevnd hava tikið, og sum hava givið bankanum trupulleikar! Nýggju eigararnir av Eik virkseminum kunnu gleða seg til hesi starvsfólk, sigur Bjarni Olsen.

*aki@sosialurin.fo*


# SMS kapping
## frá 62°N Travel

Vinn eina dreymaferð frá 62°N Travel og BravoTours til Hurghada í Egyptalandi fyri tveir persónar! Skriva „62N“ í eitt sms-boð og send tað til 1919 – so er tú við í lutakastinum

Vinnarin verður funnin mánadagin 1. novembur 2010 kl 15:00.
Hvørt svar kostar kr. 20,-
+ vanligt sms gjald.
Vinningurin kann ikki broytast og ikki býtast um til reiðan pening.

Fá meira at vita
á www.62n.fo
ella ring 340000

### Hotel Hilton ****
### Long Beach Resort

Hurghada, Egyptaland



**Ferðaskrá:**
- 1. des Vágar - Keypmannahavn
- 2. des Keypmannahavn - Hurghada
- 2.-9. des Gisting í dupultkamar á Hotel Hilton Long Beach Resort **** við „all inclusive“
- 9. des Hurghada - Keypmannahavn
- 10. des Keypmannhavn - Vágar

62°N travel

...so er ferðin byrjað!

Hoydalsvegur 17 · 100 Tórshavn
Tel: 340000 · booking@62n.fo

Fyrivarni verður tikið fyri villum og broytingum